*»Tú mást verða heppin, um tú skalt vinna ímóti einum liði sum Manchester United«*
*Ståle Solbakken, FCK-venjari*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

ÍTRÓTTUR

# Rúni skal venja toftamenn



*Í fjør eydnaðist tað Rúna Nolsøe at føra AB til uppflyting. Í ár verður tað á Toftum, at tað takið skal takast*

**Eftir at hava vissað AB uppflyting í ár, skal Rúni Nolsøe nú royna at fáa B68 aftur í fremstu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B68 hevur gjørt sáttmála við Rúna Nolsøe um, at hesin komandi árið skal virka sum venjari hjá felagnum, sum í fjør misti sætið í Formula-deildini.

Endamálið her er púrasta greitt, at felagið aftur skal vinna sær pláss millum tey fremstu í landinum, og at hjálpa sær við hesum hevur Rúni fingið tveir garvaðar veteranar hjá B68. Saman við Rúna skulu Øssur Hansen og Ingolf Petersen nevnliga standa fyri venjingunum.

## Álopið burtur

Hópurin, sum Rúni higartil hevur at arbeiða við, er í mangar mátar tann sami, sum hann var tað í fjør. Á miðvøllinum er Julian S. Johnsson burtur, men Rúni skal ætlandi virka sum spælandi venjari, og tí ber til at siga, at tað holið í ávísan mun er fylt.

Hinvegin tykist álopið at resta nakað. Teir báðir fremstu menninir frá í fjør – Anderson og Súni Fríði Barbá – hava nevnliga báðir skift felag, men enn vil formaðurin hjá B68 ikki siga nakað um, hvørt talan verður um tilgongd.

- Í útgangsstøðinum verður talan um at blanda kortini nakað øðrvísi, og so fæst at síggja, hvørt talan verður um aðrar spælarar til okkurt av plássunum.

## Ein betri platformur

Tá AB í heyst hevði vissað sær uppflyting, tóktist tað vera eitt greitt ynski, at venjarin helt fram.

Sjálvur helt Rúni Nolsøe sær tó ikki til, og hann heldur framvegis, at talan var um rætta avgerð.

- Tað er kanska ein blanding av fleiri lutum. Enn havi eg ikki øll pappírini, sum krevjast í fremstu deildini, men fyri tað kundi eg kanska virkað. Men eg kenni tað eisini so, at tað vildi verið eitt djarvt stig, um eg longu nú skuldi roynt meg í Formula-deildini. Í so máta er 1. deild ein betri platformur at royna nøkur ting, og eg eri sannførdur um, at hetta gevur mær betri møguleikar at mennast sum venjari, heldur Rúni.

## Oddbjørn skal venja AB

**Súni Fríði Barbá verður spælandi hjálparvenjari, tá ið AB skal royna at fóta sær í Formuladeildini næsta kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

AB gjørdi í gjárkvøldið avtalu við Oddbjørn Joensen um at venja Formulaliðið hjá teimum næsta kappingarár. Oddbjørn er klaksvíkingur, men hevur búð í Havn í nógv ár. Hann hevur verið venjari í HB, KÍ og onnur føroysk feløg, og hann hevur eisini áður verið venjari í AB.

– Málsetningurin er greiður. Teir dystir sum kunnu vinnast, skulu vinnast, og spælararnir mugu taka sína ábyrgd. Hettar er størsta venjingarliga avbjóðingin hjá mær, sigur Oddbjørn Joensen við heimasíðuna hjá AB.

Toppskjúttin hjá B68 í farna kappingarári, Súni Fríði Barbá, verður hjálparvenjari hjá Oddbjørn, og Súni Fríði skal eisini spæla við liðnum.

## Ólavur er enn á odda

Í tippi-kappingini hjá Sosialinum var Tórður Hentze toppskorari í fjóðra umfarinum av Champions League bólkaspælinum. Hann fekk her 49 stig, men tað er tó eitt tal, sum er lægri enn tað, sum fremstu tippararnir hava í miðal.

Í samlaðu støðuni er veddarin við navninum, Ólavur, nevnliga framvegis fremstur. Hann hevði framúr úrslit fyrstu tvey umførini, og lá greitt á odda eftir hesi. Síðani hevur Rógvi Thomsen tó eisini togað seg heilt nær, og nú eru bara trý stig, sum skilja teir báðar oddafiskarnar.

**Topp 10 fyri 4. umfar**

| Nr | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Tórður Hentze | 49 |
| 2 | Rógvi Thomsen | 47 |
| 3 | Regin Davidsen | 45 |
| 3 | Niels Jensen | 45 |
| 5 | Elmar Petersen | 44 |
| 5 | Kim Clementsen | 44 |
| 5 | Erling Fles | 44 |
| 8 | Ísak Poulsen | 43 |
| 9 | Rúni Sigurðsson | 42 |
| 9 | Jóannes N. Petersen | 42 |

**Topp 10 samanlagt**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ólavur | 208 |
| 2 | Rógvi Thomsen | 205 |
| 3 | PeturP | 195 |
| 4 | James við Brúgv | 192 |
| 4 | Jón Henriksen | 192 |
| 6 | Hallur Joensen | 191 |
| 7 | Kári Joensen | 190 |
| 7 | Dan Petersen | 190 |
| 9 | Bárður Brimvík | 188 |
| 9 | Bjarni Beder | 188 |
| 9 | Erling Fles | 188 |